# KÍ hevði avlop

**Klaksvíkar Ítróttarfelag hevði frægasta fíggjarliga úrslitið í mong ár í fjør, og á aðalfundinum í farnu viku varð formaðurin í felagnum afturvaldur fyri eitt tvey ára skeið**

AÐALFUNDUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

KÍ kundi fyri fyrstu ferð í fleiri ár vísa eitt avlop á roknskapinum fyri 2003. Eftir eitt stórt hall í 2002, hevði felagið í 2003 eitt avlop á umleið 25.000 krónur.

Hetta kom fram á aðalfundinum hjá Klaksvíkar Ítróttarfelag, sum varð hildin í farnu viku.

Gestur Hovgaard, formaður í KÍ, fegnaðist á um, at tað hevði eydnast at betra um úrslitið hjá felagnum, men hann staðfesti, at stóra skuldin hjá felagnum framvegis er tyngjandi, og ein loysn má finnast á hesum í næstum.

– Tað er framvegis heldur eingin louna, at skuld felagsins er alt ov stór, og eitt nú er stóra rentuútreiðslan ein tung byrða fyri raksturin. Tí má tað finnast ein loysn uppá skuldabyrðuna, sum ikki liggur 15 ár frammi í tíðini, men helst bara nakrar mánaðir frammi í tíðini, segði Gestur Hovgaard í síni formansfrágreiðing.

Hann helt, at ein loysn at á trupulleikanum var, at KÍ seldi KÍ-høllina.

**Formaður afturvaldur**

Á aðalfundinum stóð formaðurin fyri valið, og Gestur Hovgaard varð valdur aftur uttan mótvalevni. Hann skal tí verða bossur í KÍ næstu tvey árini.

Tiltakslimurin í starvsnevndini, Ólavur Poulsen, stóð eisini fyri valið, og hann var somuleiðis afturvaldur. Hinir limirnir í starvsnevndini hjá KÍ eru Karl Birgir Isaksen og Nichels Lützen.

Stóra kjakevnið á fundinum var ætlanin at stovna partafelag at reka besta mansliðið í felagnum. Leiðslan vildi hava nakrar meiningar frá limunum um hetta, og tað fekk hon – bæði fyri og ímóti.

Á fundinum var nýggi spælibúnin hjá 1. deildarliðnum vístur fram, og nýtt 100 ára búmerki var avdúkað.




*Eins og føðingardagsbarnið í Havn, so hevur KÍ fingið sær serstakt 100-ára búmerki*
*Mynd: www.ki-klaksvik.fo*

## KÍ hevur fingið sín málskjútta

FÓTBÓLTUR
*www.sportal.fo*

Leiðslan í KÍ hevur boðað frá, at sáttmáli er gjørdur við norska álopsspælaran Stig Edvin Asknes. Hann fær til uppgávu at gera mál fyri KÍ

26 ára gamli álopsspælarin var í síðstu viku í Klaksvík og royndarvandi, og har gjørdi hann vart við seg. Venjarin hjá KÍ segði gott fyri spælaranum, og síðani hevur KÍ samráðst við norðmannin og felag hansara.

Nú er ein avtala gjørd um, at Stig Edvin Asknes kemur til Klaksvíkar at spæla fótbólt. Hann skal styrkja um álopspartin hjá felagnum, eftir at toppskjúttin í landskappingini í fjør, Hjalgrím Elttør, fór til Danmarkar at spæla. Danski álopsspælarin Jacob Bymar, sum kom til Klaksvíkar síðsta summar, men ikki gjørdi nakað mál í landskappingini, heldur fram í KÍ í ár.

## AGF-spælari á veg til Føroya

FÓTBÓLTUR
*www.sportal.fo*

Danska heimasíðan bold.dk skrivar, at 19 ára gamli AGF-spælarin Martin Beck Andersen eftir øllum at døma skal spæla fyri eitt føroyskt felag.

Ungi og evnaríki miðvallarspælarin spældi fýra dystir á superligaliðnum hjá AGF í heyst, men nú er hann kanska á veg til eitt føroyskt felag.

Heimasíðan bold.dk skrivar, at spælarin í vikuni varð kontaktaður av einum fótbóltsumboðsmanni við góðum sambandi við føroyskan fótbólt, og gongur alt eftir ætlan, fer Martin Beck í næstu viku á venjingarlegu í Íslandi saman við føroyska felagnum sínum.

Bold.dk setir ikki navn á føroyska felagið, men vit hava skilt, at GÍ fer á venjingarlegu í Íslandi í næstum.

## Endakapping í badminton fyri yngru deildirnar

BADMINTON
*tíðindaskriv*

Leygardagin spældu yngru deildirnar endaspælið í Grand Prix-kappingin í Badmintonhøllini í Havn, og medaljur vórðu handaðar. Spælt varð í aldursbólkum: upp til 11 ár, 11-13 ár og 13-15 ár fyri bæði gentur og dreingir.

Tey, sum vunnu medaljuplássini, vóru:

**Gentur U11:**
1 Birita Poulsen VÍF
2 Súsanna Poulsen VÍF
3 Lilja Luid HBF

**Gentur U13**:
1 Fjóla Luid HBF
2 Hanna Elisa Óladóttir Arge HBF
3 Guðrið Poulsen VÍF

**Gentur U15:**
1 Brynhild D. Carlsson HBF
2 Guðrun Lervig ÍF
3 Óluva Bærentsen ÍF

**Dreingir U11:**
1 Leivur Joensen ÍF
2 Magni Hansen ÍF
3 Julian Olsen VÍF

**Dreingir U13:**
1 Bogi R. Petersen ÍF
2 Ari Ó. Ellingsgaard ÍF
3 Ari J. Ellingsgaard HBF

**Dreingir U15:**
1 Flóvin Mikkelsen HBF
2 Reidar Luid HBF
3 Sigurð D. Carlsson HBF




*Flóvin Mikkelsen úr HBF gjørdist vinnari av bólkinum, dreingir 15. Her sæst hann saman vði Reidar Luid og Sigurð Carlsson, somuleiðis úr HBF*



# Einki sløsarí

**Bæði TB og Mjølnir vunnu sannførandi sigrar á botnliðunum**

FLOGBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Tað var kanska ikki tann heilt stóri spenningurin undan dystunum í bestu kvinnudeildini í flogbólti um vikuskiftið.

Bæði oddaliðini, TB og Mjølnir, skuldu royna seg móti liðum úr tyngra endanum á talvuni, og tað skuldi eisini vísa seg, at talan ikki gjørdist um stórvegis trupulleikar av hesum.

Í Trongisvági hevði Fleyr annars hug at arga TB eina lítla løtu, men tað mundi tó standa øllum greitt, at hjá heimaliðnum var tað fyri tað mesta ein spurningur um, í hvørjum álvara leikararnir tóku uppgerðina.

Tá teir móti dystarenda veruliga settu ferð á, megnaði Fleyr heldur ikki at gera nakað sum helst, og úrslitið av seinasta settinum gevur helst eina góða mynd av, hvussu stórur styrkismunurin ímillum topp og botn veruliga er.

Í Hoyvíkarhøllini hevi Mjølnir heldur ikki teir stóru trupulleikarnar, tá tær vitjaðu KÍF, tó at raðfylgjan í settum her var hedlur øvugt teirri í Trongisvági.

Mjølnir tók sær nevnlga trygt av teimum báðum fyrstu settunum, men tá tær í triðja settinum fóru at taka sær meira av løttum, slapp KÍF eisini at spæla við. Tað mundi eisini blivið heilt spennandi móti endanum, men við 25-22 helt Mjølnir fast um 3-0.

Komandi vikuskifti er tó einki at ivast í, at spenningurin fer at verða nakað væl størri. Tá skulu tær hjá Mjølni nevnliga á Giljanes at vitja, og hetta tykist í løtuni vera dysturin, sum skal staðfesta ella avnokta, at Mjølnir gerst føroyameistari. Vinna klaks-víkskvinnurnar her, so er einki at ivast í, at gullið er heima. Eisini hóast tær í seinasta umfarinum skulu vitja á Kambsdali.

Dráttur kann hinvegin framvegis røkka onkrum heilt frammi í oddinum, um heilt væl vil til. Umframt heimadystin móti Mjølni eiga tær eisini TB á útivølli eftir á dystarskránni, og so er spurningurin, hvørt tær megna at fáa sær nóg stóra úrtøku burtur úr hesum dystunum.




*Hóast TB í løtum tók sær av løttum, so megnaði Fleyr ikki at gera stórvegis til tess at skapa órógv í oddastríðið*

## Flogbóltsúrslit

**Meistaradeild kvinnur**

| | | |
|---|---|---|
| KÍF-Mjølnir | 0-3 | (9-25, 17-25, 22-25) |
| TB-Fleyr | 3-0 | (25-22, 25-19, 25-6) |

**Meistaradeild menn**

| | | |
|---|---|---|
| Fram-Mjølnir | 0-3 | (16-25, 16-25, 17-25) |
| SÍ-ÍF | 0-3 | (23-25, 20-25, 14-25) |

Søljan-VÍF 19-27

## Upphiting til stórdyst

Ein dystur varð leiktur á Giljanesi sunnudagin, tá Søljan tók ímóti VÍF.

Gulu vestmannakvinnurnar hava í ár ikki megna at sannført um, at teir eiga at metast sum sjálvskrivaður partur av avgjørda oddastríðnum, men móti Søljuni gjørdist talan tó ikki um stórvegis trupulleikar.

Uttan at tær veruliga skuldu seta ferð á allar motorar, eydnaðist tað VÍF at toga ein 27-19 sigur heim við sær, og styrktu tær sostatt um støðuna á talvuni, har tær tykjast vera á einum tryggum triðja plássi, tó at hetta eisini kann broytast.

Skal tað henda, so krevst í øllum førum ein sigur komandi vikuskiftið, tá Stjørnan kemur á vitjan. Fyri bæði liðini má hendan uppgerðin metast sum ein stór styrkisroynd undan sjálvum endaspurtinum, og tó at tað helst verður dysturin millum VB og Stjørnuna, sum fer at avgera FM-heitið, so kann úrslitið komandi vikuskifti væl vísa seg at fáa sína ávirkan í hesum.

**-jm**

# Sørvingar úti

**SÍ megnaði ikki at standa ímóti trýstinum frá ÍF, og eru nu heilt úti úr FM-myndini**

FLOGBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Skuldu sørvingar hava bara tann allar minsta møguleikan at gera seg galdandi longur frammi enn á triðja plássinum, so var kravið ein sigur, tá ÍF kom á vitjan um vikuskiftið.

Samstundis var hetta ein dystur av alstórum týdningi fyri gestirnar, sum í verandi støðu bara mugu halda á fram at vinna, og annars bara vóna, at klaksvíkingar snáva fyrr ella seinni.

Fyrstu longu løtuna av dystinum var tað eisini so, at spenningurin um útfallið av dystinum var stórur. Fyrsta settið reið tað um snarið, tá fuglfirðingarnir megnaðu at taka sær leiðsluna, og tó at tølini vóru eitt sindur meira sannførandi næsta settið, so hevði SÍ alla tíðina eitt gott tak á.



*Fuglfirðingar vunnu 3-0 í Sørvági og halda sostatt fast um trýstið á Mjølnir í oddastríðnum í mansflogbólti*

Góða takið kastaði tó ikki nakað ítøkiligt av sær, og í triðja settinum skramblaði alt fullkomuliga saman. Sørvingar megnaðu als ikki at halda fast um trýstið, og uttan stórvegis hóvasták kundu gestirnir fara avstað við einum 3-0 sigri, soleiðis at teir framhaldandi halda trýstið á Mjølni.

Skal hetta geva úrslit í gullmerkjum, so er helst neyðugt, at teir fáa hjálp frá júst SÍ. Sørvingar taka komandi vikuskiftið ímóti Mjølnir, og so er spurningurin, hvussu tann dagurin fer at tørna út hjá Klaksvíkini. Sum nevnt aðrastaðni á síðuni, so skulu kvinnurnar hjá Mjølni tá eisini í ein avgerandi dyst á Vágoynni, og so er spurningurin helst, hvørt tað verur Queen við »we are the champions« ella Monty Python við »Allways look on the bright side of life« sum verður at hoyra í bussunum, tá farið verður eystur gjøgnum Vágatunnilin.

Hin dysturin um vikuskiftið var í Hoyvík, har Mjølnir vitjaði Fram, og her fekk SÍ ikki stórvegis av hjálp. Hóast Mjølnir ikki spílaði seg veruliga út, so megnaði Fram als ikki at hótta takið á gullmerkjunum. 3-0 til Mjølnir, sum nú kunnu fara at gera seg út til dystin í Sørvági, sum væl kann gerast endaliga staðfestingin av gullmerkjunum í mansflogbólti fyri 2004.